# Nólsoyarmálarin

## Hansara verk eru so ótrúliga orginal í teirra rørandi einsemi, heldur Kinna Poulsen, sum hevur valt út 17 verk hjá Nólsoyarmálaranum Steffan Danielsen til sermerkta framsýning nú á Ovastevnu


Hugskotið til framsýningina stavar frá bók um Steffan Danielsen, sum Emil Juul Thomsen hevur arbeitt við í mong ár, og sum kemur út í næsta mánaða

**List**


Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

"Tað finst eingin annar føroyskur listamaður, ið hevur latið so orginalar myndir frá sær, sum hesar".

So avgjørd er Kinna Poulsen, listaummælari, í bókini um Nólsoyarmálaran Steffan Danielsen, sum Emil Juul Thomsen gevur út í næstum. Men meðan vit bíða eftir bókini, fáa vit í tveir stokkutar dagar og høvi at síggja eina sera forkunnuga framsýning við verkum hjá Nólsoyarmálaranum, sum Kinna Poulsen skipar fyri í samstarvi við 100 ára hátíðarhaldið hjá Tórshavnar Kommunu.

17 av bestu verkunum hjá listamanninum hevur Kinna valt út til framsýningina. Og hóast tað ikki hevur verið lætt at velja, ivast Kinna ikki, tá hon verður spurd, hvat tað er við Nólsoyarmálarnum, sum er so hugtakandi

- Tað, sum serliga gjørdi, at eg fekk tokka til listamálaran er hansara originalitetur og so sterka einsemiskenslan í verkunum, sum eg altíð havi hildið verið serstakliga rørandi. Haldi ofta, at mentan og list gerst so uppblást og sjálvhátíðarlig. Hjá Steffan er tað beint tvørturímóti, sigur Kinna og vísir á, at hansara myndir eru so herliga niðri á jørðini, samstundis sum tær hava eitt so merkiliga lætt og ivaleyst flog.

- Og so royna tær ikki at vera listarligar - tær eru tað heilt einfalt, leggur hon afturat.

### Ótilgjørdur

Hóast Steffan Danielsen er at meta sum ein meistari innan føroyska málningalist, telist hann ikki millum okkara kendastu listafólk. Hetta hongur uttan iva saman við, at heili 28 ár eru síðani, hansara verk seinast vóru at síggja á eini stakframsýning. Ein onnur orsøk er ivaleyst eisini, at Steffan Danielsen ikki er so lættur at fáast við sum listamálari, vísir Kinna á.

- Hjá øðrum stórum, føroyskum listamálararum er tað lutfalsliga lætt at fylgja teirra útvikling frá áhugatekning til skúlagongd og naturalistiskum skitsum til ein meira sjálvstøðugan stíl. Steffan er sjálvlærdur og hevur fleiri stílir, og kronologiin í hansara verki er als ikki eins forútsigilig sum hjá øðrum listafólkum. Til dømis er tann monumentali og nationalromantiski "Varðin" (1970) nýggjari enn aðrar at síggja til nógv meira modernaðar myndir sum eitt nú "Grótlaðing" frá 1958.

Meðan Steffan Danielsen sostatt ikki er lættur at flokka, er ongin ivi um, at hann er ein føroyskur málari í orðsins sanna týdningi við øllum teimum styrkjum og veikleikum, sum tað hevur við sær.

Í bókini vísir Kinna Poulsen á, at eitt er, at myndir Nólsoyarmálarans raka tað serliga gráa í føroyska lands- og veðurlagnum so neyvt og ektað, sum eingin annar megnar at lýsa tað. Men harumframt tykjast hansara myndir merktar av eini ótilgjørdari eyðmýkt, sum er so egin og at síggja til upprunalig, at hon sýnist púra fyriuttan ta siðmentan, sum í øldir er dyrkað í akademium, konservatorium og universitetum á meginlandinum. Myndirnar eru dømi um, hvussu ósteðgandi og ótamd tann ráa skapanarmegin í roynd og veru er.

### Høgt virdur

Bókin um Steffan Danielsen, sum Emil Juul Thomsen í Nólsoy hevur arbeitt við í mong á, eigur sín stóra lut í at forkunnuga framsýningin nú verður veruleiki. Eitt nú hevur Emil innheintað rættindini til myndirnar hjá Nólsoyarmálaranum og syrgt fyri at fáa tær avmyndaðar.

Kinna greiðir frá, at hugskotið til framsýningina komst av, at Birgir Kruse og Ovastevnunevndin høvdu fingið frænir av bókaútgávuni hjá Emil.

- Vit spurdu so Emil og sonin Bjørn, um tað fór at bera til at hava eina framsýning á Ovastevnu og tað var í lagi. Húsini hjá Emil og teimum liggja beint við barnagarðin, har framsýningin verður, so tað var ikki trupult at fáa myndirnar fluttar yvir hagar, sigur Kinna.

Við framsýningini vónar hon ikki bara, at fólk fara at fáa eyguni upp fyri einum av okkara allarbestu listafólkum.

- Eg haldi eisini, at tað er nakað heilt serligt at uppliva Nólsoyarmálaran úti í Nólsoy, og hesa uppliving haldi eg, at fólk eiga at unna sær.

Spurd hvønn týdning Nólsoyarmálarin hevur havt fyri føroyska list ella hvørji spor hann hevur sett eftir seg, sigur Kinna, at


Stórsligni, tjóðskaparromantiski varðin er eisini við á framsýningini í Nólsoy á Ovastevnu